Skuggin handan framgongd

Jon og Jules skriva øll lsgini til tekstirnar hjá Nik og Jay. Teir framleiða eisini tónleikin, og standa saman við Nik og Jay aftanfyri framleiðlufyritskuna Nexus Music. Hóast Nik og Jay eru teir, sum standa í ljósinum, so hava Jon og Jules ein týðandi leildut í spelinum um framgongd hjá donsku rappdreingjunum

SAMRØÐA
Ingrid Bjørnsdein



Nik og Jay eru vælumtóktir bæði í Føroyum og Danmark. Men handan sangirnar, eru teir, ið halda sig Jon og Jules, og teir smíða øll lagini hjá donsku rappdreingjunum. Eisini teir báðir verða við á Føroya fróðini ikomandi vikuna

Mynd: www.nikandjay.dk

Aftanfyri hvønn stóran mann stendur ein stór kvinna. Men so er ikki í hesum fórum. Teir eru »hot« og teir hava framgongd. Teir eru ungir, og teir eita Nik og Jay. Men hesufevn er tao ikki nøkur kvinna í bakgrundini. Tvørturímóti. Í skuggannum av framgongdini hjá donsku rappdreingjunum standa tveir aðrir ungir menn, sum eita Jon og Jules. Teir báðir skriva lógini til allar tekstirnar hjá Nik og Jay, og framleiða tónleikin.

- Nik og Jay skriva allar teirra tekstir sjalvir, men vit skriva so lógini og framleiða tey. Vit hava arbeitt vio tónleikli uppá hendan mátan í eini fimm ár, greiðir Jules frá úr telefonini í Danmark.

Danska rappduoin kemur til Føroya um góða viku at hava konsert. Teirra pláta hevur selt yvir 100.000 fløgur í Danmark, og er tao framleiðs lutfelagið Nexus Music, sum stendur aftanfyri útgávuna. Og Nexus Music er myndað av Jon og Jules saman vio Nik og Jay.

- Vit hava arbeitt saman vio Nik og Jay í fyra ár, men undir heitinum Nexus Music hava vit bara verið til í hálvt annað ár.

Í bakgrundini

Nik og Jay eru teir, sum standa á pallinum, so tao skal ikki nógv til fyri at vokna út, at teir eru partarnir av Nexus Music, sum er vorðin kendur. Jon og Jules eru meira í bakgrundini, og biksast vio tónleikin, og royna at halda seg so anonymar sum gjørligt.

- Vit hava tao fint vio at standa í bakgrundini. Fólk eru góð til ymiskt, og Jon og eg hava valt, at tao skuldi verða uppá hendan mátan. Millum annað var tao talan um, at myndir skuldu vio av okkum í fløguhúsan, men tao valdu vit so frá, tí vit dugdu ikki at siggja nakra orsøk til tess, sigur Jules.

Hann greiðir frá, at tao eru nakrir »hardcore« fjeppar, sum vilja vita alt um Nik og Jay, sum skriva teldupost til teirra og spyrja um ymiskt. Men fríið fáa teir at ganga oman eftir gótuni.

- Tey fólkini, sum vit yrkja vita, hvørjir vit eru, vita tao. Tao verða seg framleiðslufólk og so vioari.

Um eina góða viku gongur leiðin so upp til Føroya. Vanligt, so eru Jon og Jules verri enn so ikki vio á øllum konsertunum hjá Nik og Jay, men vio til Føroya koma teir.

- Vit vóru nógv vio í fyrstuni, tá vit skuldu hava alt upp at koyra og rætta allar smáluttir. Vit fyra styra showinum saman, so tá royndu vit at vera vio, men nú hava vit eina rógvu av fólki, sum ger eina rógvu av tingum, so nú eru vit bara vio til fimtu hvørja konsert, sigur Jules.

- Men vit koma vio til Føroya. Men tao er mest fyri upplivilsin. Eg havi hoyrt, at tao er ógvuliga vakurt í Føroyum, og tit hava nakrar vakrar oyggjar

Droymt um meira

Jules dylir tó ikki fyri, at hann væntar, at tao er óvissi í Føroyum enn í Danmark.

- Eg venti ikki, at mannin verður so stórur tá teir fara á pallin, men eg giti, at fólk hava ein annan hugbuð, so eg havi fyrireikað meg til ein minni »kultursjokk«, sigur Jules og flennir.

Nú eru Nik og Jay vorðnir heilt stórir í Danmark, og í gjár, kom út fløgan vio Alex, sum Jon og Jules eisini hava framleitt. Dreymarnir eru nógvir og stórir, men Jules ásannar, at teir kanska hóvdu dreymt um eitt sindur meira enn hetta.

- Tá vit byrjaðu, so vóru vit tao fyrsta hálva árið fullir av framsøkni. Og vit hóvdu nógvar setlanir, og vit hóvdu vónao at gerast stórir, greiðir Jules frá. Hesin dreymurin kann tó ikki vera brostin enn, tí setlanirnar í framtíðini eru nógvar og greiðar. Nik og Jay syngja á donskum, men nú verður spælt vio tankanum um at fáa teir út á eingilskum eisini. Alex syngur á eingilskum og væntar Jules, at hansara fløga fer at koma út í øllum Evropa.

- Tao nyttar ikki at hava evnini um tú ikki ert framsøkin, og tao nyttar heldur onki at vera framsøkin og ikki hava evni, sigur Jules.

- Vit liva í einum »jantelóg« samfelagið, og vit spæla okkum vio nógvum ðorum tankum. Men vit mugu fáa fólk at gerast meira framsøkin og fáa fólk at trúgva uppá seg sjálvi.

Nógvar spennandi verkætlanir liggja undir vatnskoupuni hjá Nexus Music. Kanska okkurt R´ín B, og kanska einafero verður Nexus Music til meira enn bara tónleik. Kanska filmur og klæðir kunnu koma vio í tao, sum í dag verður kallað Nexus Music.

- Vittosa ikki um í ár, ella næsta ár ella árið aftaná tao. Vit hava nógv hugskot, men tao verður kanska einafero langt inní framtíðini. Framsøkni er alt avgerandi.

Hart arbeiði

At vera í tónleikavinnuni er eitt hart arbeiði. Og nógv hevur eisini verið arbeitt hjá donsku Jon og Jules.

- Tá vit arbeiddu vio Alex fløgunni, so arbeiddu vit upp til 70 tímar um vikuna. Tao er hart, og tao kostar í tí privata ðkinum, men vit elska tao vit gera. Hetta er eisini eitt ítuv hjá okkum, tí annars hóvdu vit ikki hildið til hetta. So setlanin er at arbeiða vio tónleiki restina av lívinum.

Nú standa Føroyar so í øllum fórum í kalendaranum, og teir donsku framleiðaramir gleða seg at koma hendan vegin.

Robbie Williams Jam í C20

Friggjakvøldið verður »The Best of Robbie Williams« at hoyra í Club 20 í Havn

TÓNLEIKUR
Ingrid Bjørnsdein


Tað verður ikki Robbie Williams sjálvur, sum kemur at spæla í Club 20 friggjakvøldið. Men danski bólkurin Robbie Williams Jam fer at spæla tað besta og kendasta hjá manuframa onglendinginum

Fyri fyrstu ferð í Føroyum kemur danski tónleikabólkurin Robbie Williams Jam at framfara. Teir verða í Club 20 friggjakvøldið.

Tónleikabólkurin, sum er mannaður vio dørum, hevur fríðuskan trummusláara, sum eitur Fríði Øster.

Robbie Williams Jam er, sum liggur í navninum, ein bólkur, sum spælir lóg hjá navnaframa onglendinginum av sama navni. Teir eru serstakliga vel umtóktir á flatlondum, og seinasta árið hava teir spælt á 50 konsertum. Millum annað vóru teir vio á Skandeborg Festivalinum, har Gestir eisini luttóku.

Umframt tónleikabólkin fer Peter at venda plátum, og verður hann eisini aftur leygarkvøldið.

Atli og Sveinur eru við gott mót og stevna framvegis móti Keyp-mannaðarvanum á skutarnum teirra

Samansett

Skutarnir á ferð í Norra

Kendu menninir í vatnskutarar vóru seinasta, vit frættu, á ferð í norska skergarðinum

SKUTARAFERÐ
Heri á Rógvi

Mikum orgun: Fartelefonin hjá Atla S. Pedersen svara ikki. Umvegis heimasiðu fretta vit tó, at heimsins kendastu menn á vatnskutara eru staddir í Norra.

Atla og felagin Sveinur Hjígnason komu til Stavanger í Noregi, men ikki uttan eitt sindur av tropullleikum. Skutarin hjá Atla fekk vatn í bensintangan, so teir báðir hóvdu tørv á hjálp at koma til lands. Hesa hjálp fingu teir frá einum supplyskipi.

Og eftir eina nátt á góðum gistingarhúsi hava teir aftur sett skutamar á sjógv og leiðin gongur til norska býin Mandal. Siglt verður í norska skergarðinum, eftir hvat vit frætta. Í Mandal, sum er í suðvendanum av Noregi, verður siglt vioari til Danmarkar. Seinni í dag, mánadag, skal avgerð takast, hvørt teir skulu fara vioari í dag ella í morgin.

Í Sosialinum í gjár frættu vit eisini, at áhugin fyri feninni hjá teimum føroyingunum er stór allastaðni – og minst av øllum frá føroyskum fjølmiðlum.

Nú verður spennandi vita, hvør áhugin verður, tá teir lenda á Langelinje.

Eitt sindur til øll

Stjórin í Norðurlandahúsinum heldur tað ríddina vera tað týðningarmesta við Listastevnuni

LISTASTEVNA
Heri á Rógvi

Í farnu viku hóvdu pust vio stjóran í Norðurlandahúsinum og forkvinnuna fyri styrkin fyri Listastevnuna, Helgu Hjørvar, um Listastevnuna. Greitt varð frá, hvussu stevnan verður figgjað og lagt til rættis figgjarliga.

Tað er greiða fatanin hjá Helgu, at breiddin skal vera til staðar á Listastevnuni.

– Tað er týðningarmikið, at stevnan hevur nakað fyri øll. Tað er eftir mínum tykki fint, um øll kunnu finna eitt ella tvey tilbók, tey hava hug at fara til, sigur Helga.

Hesa vikuna

Listastevnan verður á skránni hesa vikuna út.

Mánakvøldið framfórir Eivør Pálsdóttir. Annars eru millum annað Shabana Rhaman, stand-up, og filmurin Føroyardk á skránni seinni í vikuni.

Listastevnan skal hava nakað til øll, heldur Helga Hjørvar

Samansett

Havnin automattelefon í 50 ár

1. mai 2003 vóru liðin 50 ár síðan Havnin fekk automat-telefon. Øll telefonnummur blivu nú fýra-sifraði, áðrenn tað hevði tey verið trý-sifraði

TELEFONSØGA
Magnus Gunnarsson

Á forsíðuni á Dimmalætting 25. apríl 1953 stóð at lesa:

»Automat-Telefon í Thorshavn í næste Uge

Det nye Anlæg tages i Brug ved Midnat Thorsdagden 30. april

Thorsdag í kommende Uge kl.12 Midnat tages det nye helautomatiske telefonanlæg i Thorshavn i brug, og fra Store bededagsmorgen skal Thorshavnerne ikke »ringe« men dreje paa Skiven naar de telefonerer. Man føler sig næsten henladt til »God's own Country« som Amerikanerne med Kladelig Beskedenhed plejer at benævne USA.

Automat-Centralen skulde efter Planen være traadt i Funktion allerede 1. april, men som Følge af forskellige Forsinkelser sker det altsaa nu, en Maaned senere. Til gengæld hævder Sagkundskaben, at Anlægget nok skal komme til at virke tilfredsstillende. Automat-Centralen har nemlig lige siden December i fjor fungeret som Lokal-Central for Telefonhusets forskellige Afdelinger og Tjeneste telefoner i Byen – og der har ikke været et eneste uheld.«

»Fra Store bededagsmorgen skal Thorshavnerne ikke »ringe« men dreje paa Skiven naar de telefonerer«. Sokallaða stóð at lesa í Dimmalætting 25. apríl 1953

Mynd: Árni Haraldsen

Dimmalætting hevði verið og vitjað á telefonverkinum.

Annars stóð hesin tíðindastubbin í Dagblaðnum 30. september 1947:

»Telefonsteyrar

Telefonverkið fekk hópin av telefonsteyrum við Tjaldrinum seinast. Hetta man fara at fríða mangan sum í ársvís hevurðið eftir at fingið telefon lagda inn.«